## Terry vil venja Chelsea

Liðformaðurin hjá Chelsea, John Terry, hevur júst gjørt nýggjan fimm ára sáttmála við Chelsea, og hann verður roknaður sum hjartað á Chelsea-liðnum. John Terry avdúkar nú, at hann saktans kundi hugsa sær at hildið fram í felagnum, tá hann gevst at spæla. - Eg ætli mær at verða venjari, tá eg gevist at spæla, og eg hevði elskað at verðið venjari hjá Chelsea, sigur John Terry við Daily Express.



## Jónas fekk avsmurning

Tað gongur einki hjá Frem í donsku 1. deild. Higartil hevur liðið bert fingið eitt stig, og um vikuskiftið varð Frem hølvað av. AC Horsens tók ímóti Frem, og tað endaði við heili 8-1 til teir úr Horsens. Í hálvleikinum var støðran longu 4-0 til AC Horsens. Frem minkaði um munin til 5-1, men seinasta korterið skoraði AC Horsens trý mál afturat.

# Gummiroykur í Gundadali

**Einasta staðfestingin á triðja seinsta leikdegnum varð niðurflytingin hjá 07 Vesturi. HB snávaði aftur hesaferð, og nú byrjar so smátt at lukta av gummi í norðara endanum av Gundadali**



**HB var fyri stórum vónbroti í Fuglafirði. Enn er avgerðin um FM-heitið fult og heilt í hondunum hjá HB, men somu hendir eru av álvara farnar at ristast, nú bara tvey umfør resta av kappingini**




Jákup Mørk

Við bara tveimum umførum eftir at spæla, er Vodane-deildin meira spennandi, enn hon hevur verið tær nógvu seinastu vikurnar. Bæði í toppi og botni.

Í oddinum hevur tað í fleiri vikur verið spurningurin, nær HB vissaði sær gullið, og kanska er tað eisini hugburðurin, sum spælararnir sjálvir hava havt.

Í øllum førum er úrtøkan hjá HB seinastu seks dystirnar als ikki tann, sum líkist einum meistaraliði, og dyggi lúsingurin í Fuglafirði ber við sær, at HB framvegis »bert« er fimm stig framman fyri EB/Streym, sum greiddi torføran setning á útivølli til UG.

Hóast avgerðin framvegis liggur fult og heilt hjá HB, so er ikki sørt, at støðan minnir um hana, sum var fyri tveimum árum síðani, tá EB/Streymur í seinastu minuttunum av seinasta dystinum misti FM-heitið, sum annars leingi lá so púrasta trygt til felagið.

Á pappírinum er talan tó um yvirkomuligar uppgávur hjá HB seinastu umførini, tá teir spæla móti teimum báðum, sum eru niðast á talvuni. Men eingin ivi er um, at KÍ kann geva oddaliðnum og arvafíggindunum ein skarpan gang í Gundadali, og hendir tað, kann væl vera, at alt stendur og fellur við seinasta dystinum hjá HB, tá teir á útivølli skulu spæla móti nú niðurflutta 07 Vestur.

### Kapprenning í botninum

Sigurin hjá ÍF á HB staðfesti samstundis, at Vodafone-deildin í ár skal siga farvæl við annað hvørt B36 ella KÍ. Bæði liðini eru av álvara farin í holt við kapprenning í botninum, og enn hevur B36 munin í hesari kapping.

Kravið hjá KÍ er í minsta lagi fýra stig í teimum báðum komandi dystunum móti HB og EB/Streymi, meðan B36 helst skal fáa okkurt fyri sínar dystir móti Víkingi og B68.

Nú kann sjálvandi vera, at allir spurningar í hesum verða svaraðir longu sunnudagin, men undir øllum umstøðum stendur púrasta greitt, at talan verður um fullsett áskoðaraskýli í Gundadali sunnudagin. Og neyvan munnu reyðu leyvurnar hjá HB fara at taka á við KÍ hesaferð.

### Europisku plássini

Hjá AB og ÍF kundu úrslitini sunnudagin bent á, at kappingin nú er av fyri teirra viðkomandi, men enn stríðast Víkingur, EB/Streymur, B68 og NSÍ um heiðursmerki og europiskan fótbólt. Her er greitt, at Víkingur longu hevur vissað sær sítt pláss umvegis steypakappingina, og so er bara spurningurin, hvørji tvey lið skulu fylgja teimum í hesum.

**Seinastu umførini**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **26. umfar** | | | |
| 27-Sep | HB | - | KÍ |
| 27-Sep | EB/Streymur | - | ÍF |
| 27-Sep | NSÍ | - | AB |
| 27-Sep | Víkingur | - | B36 |
| 27-Sep | B68 | - | 07 Vestur |
| **27. umfar** | | | |
| 3-Oct | B36 | - | B68 |
| 3-Oct | AB | - | Víkingur |
| 3-Oct | ÍF | - | NSÍ |
| 3-Oct | KÍ | - | EB/Streymur |
| 3-Oct | 07 Vestur | - | HB |

## Trúgva upp á møguleikan

Heðin Askham, venjari hjá EB/Streymi, fegnast, at liðið framvegis hevur møguleika at røkka meistaraheitinum.

- Vit trúgva uppá tað, so leingi tað er teoretiskur møguleiki, men kiksa vit einaferð, so er liðugt. Tí mugu vit taka ein dyst á gangin, og bara taka tað vit fáa, segði Heðin Askham eftir sigurin í gjár.

Hann legði afturat, at hann er sera fegin um spælið hjá EB/Streymi og at hann gleðist um, at leikararnir ongantíð bakkaðu.

- Vit vóru púra klárir, tá dysturin byrjaði, og so blivu vit bara betri og betri, staðfesti Heðin Askham.

-eij

## Torført at seta leikarar upp

AB er tryggjað í deildini, og hetta metir John Petersen, annar av venjarunum hjá AB, hava við sær, at leikararnir taka ov lætt upp á tingini.

- Tú kanst siga, at tað er torført at seta leikararnar upp. Vit høvdu eina stima, sum bjargaði okkum endaliga, og tí kann tað vera, at spælararnir slappa ov nógv av. Men spælararnir eru eisini greiðir yvir, at hetta ikki skal vera myndin av AB gjøgnum árið, segði John Petersen.

Hann staðfestir eisini, at EB/Streymur var nógv tað betra liðið í gjár.

- Kvaliteturin í øllum vit gera er lægri enn hann eigur at vera. Men tað spælir eisini við, at Aristide ikki er við í dag, tí tað skapar eitt sindur av órógvi í miðverjuni. Men tað eigur ikki at gera munin til 3-0, staðfestir John Petersen.

-eij

# HB mótmælir eisini

**Umframt leikbannið til Keita gav Aganevndin eisini gult kort til Hanus Thorleifsson hjá HB. Og heldur ikki har vilja tey góðtaka mannagongdina, sum ikki innihelt partshoyring**




Jákup Mørk

Talan var um kontroversiella hending, tá Hanus Thorleifsson í heyst skoraði til 2-0 í útidystinum hjá HB móti KÍ.

Sjónvarpsmyndirnar vístu greitt, at Hanus nýtti hondina, tá hann fekk bóltin fram við Jákupi Mikkelsen, men dómarin sá ikki hendingina, sum tí gav mál.

Aganevndin hevur nú viðgjørt málið, og har eru tey samd um, at hetta átti at kosta gult kort til spælaran. Eitt kort, sum tó ikki fær stórvegis ávirkan, tí spælarin nú er farin til Danmarkar í útbúgvingarørindum.

Eins og við málinum um leikbannið til Ahmed Keita, so vantar partshoyring í málsviðgerðini, og tað vil leiðslan í HB ikki finna seg í.

- Eitt er, at ein avgerð verður tikin um at sekta ein leikara fyri eitt brot, ið skal vera framt fyri so langari tíð síðani, talan er um einar 6 vikur. Men annað er, at vit als ikki vóru varug við, at hetta málið var á veg ella varð viðgjørt. Og tað kenst løgið at skula gera viðmerkingar til eitt mál ella verða hoyrdir - eftir at málið er avgjørt, skrivar Niels Juel Arge, formaður í HB millum annað í teldubrævi til FSF.

- Øll lið og allir venjarar vilja sera fegnir vita, hvørjir leikarar eru tøkir, men í hesum førinum hevur eingin vita nakað, fyrr enn avgerðin bráðliga verður almannakunngjørd - á tí seinasta gerandisdegnum undan einum avgerandi leikumfari, sum tey seinastu leikumførini vanliga eru.

- Hetta kann ikki góðtakast, og tí vilja vit heita á FSF um nú antin at rudda upp í sínum reglum og lógum - ella í minsta lagi umsita hesar, so tær ikki eru til bága fyri limirnar í FSF. Tað ger ikki støðuna betur, at eisini onnur (iva)mál eru á skránni fyri tíðina.

- Sum støðan er í løtuni, kenna nógv feløg seg ikki serliga trygg, hvat umsiting og tulking av reglum FSF's viðvíkur, og tað er ikki nøktandi. Úti í feløgunum verður løgd stór, ólønt, orka í at fáa tingini at hanga saman, og tí hava feløgini ikki tørv á slíkari ógreiðu um lógir, reglur og umsiting av hesum, stendur at enda í teldubrævinum.